ÚTSØLAN HELDUR FRAM







| | | |
|---|---|---|
| Ideline honddustsúvari | 530,- | 365,- |
| Voss eymhetta vhm605-0 stál 363 m3 (58db) | 4195,- | 3145,- |
| Voss eymhetta vhm617-1 hvít 560 m3 (50db) | 3595,- | 3055,- |
| Voss eymhetta vhm605-1 hvít 363 m3 (58db) | 3295,- | 2195,- |
| Moulinex hvirla (Avmarkað nøgd) | 668,- | 499,- |
| Moulinex fritura Acp251 1000g 18W (Avmarkað nøgd) | 998,- | 798,- |
| Tefal fritura 6273 1000g 2000 Watt | 1495,- | 1160,- |
| Miéle micro m625w digitalur 21 L | 5430,- | 4895,- |
| Elvita micro 20l. 800 Watt | 1290,- | 999,- |
| Buknecht micro 21L digitalur 1000 Watt | 3395,- | 2795,- |
| Thermex deco vegg eymhetta stál (Avmarkað nøgd) | 7495,- | 6745,- |
| Blomberg komf rur 50 cm yvir- & undirvarma | 5995,- | 4795,- |
| Miéle fingertouch km465 | | |
| Miéle innb. ovnur h316bw v/luft grill & klokku hvítur | 15990,- | 13995,- |
| Blomberg uppvaskimaskina dwf041 hvít | 5995,- | 5395,- |
| Asko turkitrumla kondens El st ring | 10595,- | 8995,- |
| Asko trukitrumla Avtrek El st ring | 9995,- | 8295,- |
| Creda turkitrumla Kondens | 5995,- | 4395,- |
| AEG turkitrumla kondens (Avmarkað nøgd) | 9795,- | 8815,- |
| AEG turkitrumla Avtrek (Avmarkað nøgd) | 7595,- | 6835,- |
| Bauknecht turkitrumla Avtrek (Avmarkað nøgd) | 5795,- | 4900,- |
| Gram køliskáp ks240-06 H: 1070mm B: 550mm (energi B) | 5995,- | 5090,- |
| Gorenje køl/frysti k336/2p H: 1770mm B: 600mm (energiA) | 10450,- | 8500,- |
| Zanussi køli zt155 H: 85cm B: 55cm (energi A) | 3290,- | 2595,- |

VØSK FRÁ BLANCO









2864,-



Siemens komfýrur v/luft grill & keramik

Vanl. prísur 9195,-

Nú einans 7795,-

Elkeyp

HTH Køksmiðstøðin

Á Hálsi
FO-100 Tórshavn
Tel. 31 49 49 • Fax 31 13 30
www.hth-kokar.com


# Nýggjur borgarstjóri á Sandi

**Sands bygdarráð valdi fríggjakvøldið Jóhan Petur í Soylu sum bygdarráðsformann**

KOMMUNUR
*Heri á Rógvi*



*Jóhan Petur í Soylu, nýggjur borgarstjóri heiman á Sandi.*
*Mynd: Heri á Rógvi*

**Sandur:** À býráðsfundi hjá Sands bygdarráð fríggjakvøldið var val av nýggjum býráðsformanni á skránni.

Páll á Reynatúgvu er valdur borgarstjóri, men hann er farin í annað starv, og hevur Tórur Johannesen røkt starvið fyribils, tá Páll er í farloyvi.

Í bygdaráðsfundinum fríggjakvøldið vóru tvey uppskot til borgarstjóra:

Jóhan Petur í Soylu og Eyðun Viderø.

Endin gjørdist, at Jóhan Petur fekk fýra atkvøður og Eyðun fekk tvær og ein var blank. Sostatt er Jóhan Petur í Soylu nýggjur borgarstjóri í Sands kommunu.

-Eg valdi at stilla upp, tí tað var ein meirluta aftanfyri meg, sigur Jóhan Petur í Soylu við Sosialin. Hann visti um stuðulin áðrenn fundin, sum hevði valið av bygdaráðsformanni sum einasta punkt á skránni. Nýggi borgarstjórin ætlar at halda fram á somu leið, sum er førd higartil. Hetta merkir so eisini, at hildið verður fram ímóti at fáa eina ítróttarhøll á Sandi.

Meirilutin í Sands bygdarráð er eisini broyttur. Fyribilsborgarstjórin, Tórur Johannesen er farin burturúr meirilutanum, og Jákup Birgir Mohr, ið varð valdur á einum lista fyri seg, er vorðin partur av meirilutanum. Tórur Johannesen var annars valdur á sama lista sum Jóhan Petur í Soylu til kommunuvalið seinast. Tórur Johannesen heldur fram sum varaborgarstjóri. Nevndirnar í bygdarráðnum eru eisini broyttar nakað.

Meirilutin telur nú: Jóhan Petur í Soylu, Eli Hentze, Olga Fossdalsá og Jákup Birgir Mohr.

Minnilutin verður mannaður av: Tóri Johannesen, Jonnu Krog og Eyðuni Viderø.



# Bara reint órudd

**Tað rennur evja undan einum tanga, sum stendur inni á Sundi. Illgruni hevur verið um, at talan er um útlát frá sjúkum laksi, men tí vísir Heilsufrøðiliga Starvstovan aftur**

UMHVØRVI
*Edvard Joensen*



*Tað rennur evja úr einum goymslutanga, sum saman við eini kvørn til at mala deyðan fisk í, stendur inni á Sundi. Hetta er tó óskaðiligt, sigur Heilsufrøðiliga Starvsstovan*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Sund:** Tað stendur ein tangi við slógvi frá alifiski inni á Sundi. Undan tanganum rennur okkurt lýsikent, sum fólk hava óttast fyri kann vera útlát frá sjúkum fiski. ILA hevur verið nevnt í hesum sambandi. Men so er ikki, verður sagt av Fiskisjúkudeildini hjá Heilsufrøðiligu Starvstovuni.

Talan er um ein tanga og eina kvørn, sum sett vórðu upp á Sundi um tað mundið, tá brennistøðin á Hjalla var stongd nakað fyri ólavsøku, sigur Øssur Hansen, eftirlitsmaður á Fiskasjúkudeildini hjá Heildufrøðiligu Starvsstovuni.

Tangin varð settur upp saman við eini kvørn at mala fisk í, soleiðis at alarar á Kaldbaksfirði sjálvur kundi beina fyri tí fiski, sum doyði í ringunum og tískil ikki kundi seljast.

Vanliga mannagongdin er annars, at slíkt eftir avtalu verður brent á Kommunalu Orku- og Brennistøðini á Hjalla.

Tangin og kvørnin vóru sett upp í samráð við og undir eftirliti av Fiskasjúkudeildini, og var avtalan, at tey skuldu beinast burtur aftur, tá brennistøðin lat uppaftur.

Hví tey enn ikki eru burturbeind, duga tey á Fiskasjúkudeildini ikki at siga, og ikki bar til at fáa orð á alaran, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Hinvegin sigur Øssur Hansen, eftirlitsmaður á Fiskasjúkudeildini, at tað, sum renur undan tanganum, er óskaðiligt, og als einki hevur við ILA sjúku at gera, sum annars hevur verið róð framundir.

Hann sigur, at fyribeiningin hevur verið eftir fyriskrivaðum reglum, og Heilsufrøðiliga Starvsstovan ikki hevur havt nakað at funnist at í so máta.

Av Komunalu Orku- og Brennistøðini verður sagt, at har kenna tey einki til hendan tanga inni á Sundi, og at haðani er hann ikki umbiðin.

# Skipaeftirlitið flytir um fjúrtan dagar

**Skipaeftirlitið letur alment upp í nýggjum hølum í Miðvági tann 19. august. Skrivstovan í Havn verður stongd hósdagin og fríggjadagin í hesi vikuni vegna flyting**

SKIPAEFTIRLIT
*Edvard Joensen*




*Skipaeftirlitið letur alment upp í gomlu smiðjuni hjá JK Joensen í Miðvági tann 19. august*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Miðvági:** Skipaeftirlitið letur upp í nýinnrættðaum hølum í Gomlusmiðju í Miðvági mánadagin 19. august. Í samband við flytingina verður skrivstovan í Havn stongd hósdagin og fríggjadagin í hesi vikuni.

Eftir ætlan skuldi Skipaeftirlitið latið upp í Miðvági tann 1. august, men nú gongur ikki altíð, sum ætlað, staðfestir stjórin, Óla Hans Hammer Olsen.

Høvuðsgrundin til, at eitt sindur varð seinkað nú, er tann, sigur hann, at gólvið er umvælt, og tilfarið, sum har er brúkt, skal hava nakað væl av tí at festa seg.

Í aðrar mátar er hann væl nøgdur við umbyggingina, sum gjørd er. Húsið er bygt um eftir ynski frá teimum, sum skulu brúka tað, og tað fer ivaleyst at roynast eftir ætlan, væntar stjórin á Skipaeftirlitinum.

Hóast tað ikki verður latið upp alment fyrr enn tann 19. august, man lív fara at vera í húsinum eina viku ella so undan tí degnum, er væntandi. Tí hósdagin og fríggjadagin í hesi vikuni verður skrivstovan í Havn stongd vegna flyting, og tá farið veðru aftur til arbeiðis komandi mánadag, skuldi tað helst verið í nýggjum hølum í Miðvági.

Skipaeftirlitið fær eisini nýtt telefonnummar, nú flutt verður. Nýggja nummarið verður 35 56 00, og nýggja telefaksnummarið verður 35 56 01, sigur Óla Hans Hammer Olsen.

Hann greiðir frá, at tað í dag arbeiða sjey fólk á Skipaeftirlitinum. Men søkt er eftir tí áttanda, og umsóknarfreistin er úti.

Tað eru fleiri umsóknir komnar, sigur hann. Og talan er um fólk við góðum kvalifikatiónum. So skjótt liðugt er at flyta, verður ein eftirlitsmaður settur, og fær so boð um tað beinanveg, upplýsir stjórin á Skipaeftirlitinum.

Hann sigur, at talan er um eftirlitsmann í orðins bókstaviliga týdningi, tí bara menn hava søkt.

– Hetta er eisini ein mansdominerað verð, sigur hann. Krøvini eru soleiðis, at tað traditionelt ikki eru kvinnur, sum lúka tey krøvini, sett verða.

Millum annað verður kravt av umsøkjarunum, at teir hava ávísa útbúgving, eitt nú maskinmeistrarar, umframt at teir skulu hava so og so langa siglingstíð og prakstiska royndir.